# STROK - oftari og størri

**Nógv nýtt er í væntu hjá haldarum av barna- og ungdómsblaðunum Strok. Nú kemur blaðið 10 ferðir árliga, í mun til 8 ferðir, blaðið er vaksið við fleiri blaðsíðum og nógvum nýggjum tættum, og seinni í heyst fer tann nýggja heimasíðan hjá Stroki at vera klár at brúka.**

BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Beinta Johannesen, sum er ritstjóri á blaðnum*

So er Strok aftur í skúlunum! Beinta Johannesen, sum er ritstjóri á blaðnum hevur nógv nýtt í huganum, nú hon hevur ábyrgdina av at fáa blaðið út 10 ferðir árliga, í mun til 8 ferðir higartil. Beinta greiðir frá, at í hvørjum blaði eru greinir um okkurt serligt evni, har prát eisini eru við børn og ung.

– Hesa ferð hava vit tosað við Sólfríð í Vestmanna um heimalomb, og Rannvá av Velbastað, Fríður av Argjum og Ólavur úr Hoyvík siga frá um skúlastovur teirra. Eisini eru góð hugskot til eina floksveitslu, tíðindi, søguna um fótbóltsspælið, ummælir, Blits – súrt og søtt um tey kendu og mangt annað, sigur Beinta, sum eisini vísir á afturvendandi tættir, eitt nú gaman, teknisøgur, krossorðagátur, søgur, úr Bíbliusøguni og fleiri uppgávusíður.

**Nú enn fleiri STROK**

Beinta sigur, at í samband við 50 ára føðingardagin hjá Stroki, fáa allir lesarar eina serliga gávu.

– Nú fer Strok, sum seinastu árini hevur havt einar 3.200 haldarar, at koma út 10 ferðir um árið ístaðin fyri 8 ferðir, og vit kunnu lova, at jólaútgávan av Stroki verður nakað heilt serligt! Tað er ikki alt, tí blaðið er eisini vaksið við fleiri blaðsíðum og fleiri nýggjum tættum, og seinni í heyst fer tann nýggja heimasíðan hjá Stroki at vera klár at brúka, sigur Beinta, sum er í gávumilda lagnum:

– Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer Strok nú at geva haldarum sínum eina ókeypis fløgu við sangum, ið tey bæði Meyla & Knøttur syngja, eins og tey hava gjørt á teimum ymsu festivalunum, sum hava verið á í summar, sigur Beinta.

Og hon greiðir frá, at sangirnir á fløguni hava Meyla & Knøttur gjørt saman við manningini aftan fyri tann sera vælumtókta gentubólkin av Sandi, Poppkorn.




*Í hesum døgum fáa øll skúlabørn høvi at seta seg fyri Strok skúlaárið 06/07. Allir næmingar í fyrsta flokki fáa fyrsta blaðið ókeypis.*

– Tó eru sangirnir als ikki bara fyri gentur. Fimm svingandi løg eru á fløguni, og við heitum so sum 'Lort í býin'og 'Eg eri sum eg eri' skuldi har verið okkurt fyri øll.

**Lort í býin!**

30. september og 1. oktober 2006 verða show við Meylu & Knøtti í Norðurlandahúsinum, har Meyla & Knøttur saman við dansarum sínum og kulasta punkbólkinum í Føroyum, The Dreams, fara at framføra eitt show við sangi, dansi, skemti, ljósi, ljóði. Atgongumerki fáast í Norðurlandhúsinum og sølan byrjar 15. september 2006. Haldarar fáa sjálvandi atgongumerki fyri serliga prís, siga tey fýra í blaðstjórnini, sum eru Beinta Johannessen, blaðstjóri, Niels Jákup Thomsen, Bergur Dalsgaard og Eyðna Magnussen.

# Mentanarnevndin á kunningarferð

**Mentanarnevnd Løgtingsins er á kunningarferð í Danmark og Svøríki, har evnini verða kirkjulóggáva, mentanarpolitikkur í útjaðaranum og stuðul til útflutning av tónleiki.**

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Andrias Petersen, formaður í mentanarnevnd Løgtingsins*

Sambært Andrias Petersen, sum er formaður í mentanarnevnd Løgtingsins, hevur verið vanligt, at nevndin fer á uttanlands kunningarferð á øðrum hvørjum ári. Á fundi í mentanarnevndini tann 2. mai, varð avrátt, at fara á ferð til Danmarkar og Svøríkis í september at kunna seg við viðurskiftini millum kirkju og stat, og hvussu man í Svøríki frá almennari síðu hevur verið við til at menna mentanarøkið.

Tá vit prátaðu við Andrias Petersen týsmorgunin, var nevndin júst komin á vitjan hjá Kongaligu Operuni í Keypmannahavn. Hagani gongur leiðin út á danska kirkjumálaráðið, har fundur verður við Bertil Haarder og embætisfólk, um hvørjar hugsanir danir gera sær um kirkjulóggávu í framtíðini.

Nevndin fer síðani til Svøríkis í kvøld, og í morgin árini verður vitjað hjá biskupinum, Caroline Krook, sum fer at greiða frá um, hvørjar royndir sviar hava gjørt sær, eftir at teir valdu at slíta sundur sambandið millum kirkju og stat tann 1. januar 2000.

Seinni í morgin fer mentanarnevndin á vitjan í svenska mentamálaráðnum, har statsráðið, sum kann samanberast við ein vararáðharra, fer at greiða frá um svenskan mentunarpolitikk, við serligum atliti til útjaðaran. Harumframt hevur nevndin heitt á statsráðið um at greiða frá um tann serliga mentanarstuðul, sum sviar lata útflutningi av tónleiki og sum hevur víst seg at eydnast væl.

Við á kunningarferðini í Danmark og Svøríki eru limirnir í mentanarnevnd Løgtingsins: Andrias Petersen, formaður, Jógvan við Keldu, næstformaður, Marjus Dam, John Johannessen, Olav Enomoto, Heidi Petersen og Tórbjørn Jacobsen. Nevndin kemur heim aftur hóskvøldið.

# Strandferðslan lagar seg til broyttar karmar

**Av tí, at ein arbeiðsbólkur er settur at endurskoða virksemið hjá Strandferðsluni, hevur Innlendismálaráðið gjørt av at bíða við at lýsa starvið sum stjóri á Strandfaraskipum Landsins leyst.**

SAMFELAG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sambært Innlendismálaráðnum, hevur Strandferðslan verið fyri stórum broytingum seinastu árini.

– Busskoyringin er bjóðað út til privatar at reka. Vesturleiðin og Leirvíksfjarðarleiðin eru niðurlagdar, og Farmaleiðir eru seldar. Talið av starvsfólkum er soleiðis minkað úr yvir 200 fólkum og niður í 120 fólk eftir fáum árum. Tá tunnilin til Sandoyar møguliga verður veruleiki um fá ár, so fer hetta aftur at merkja eina munandi minking í virksemimum hjá Strandfaraskipum Landsins, sigur Innlendismálaráðið í tíðindaskrivi, og víðari verður ført fram, at:

– Gongdin á samferðsluøkinum í seinastuni ger tað viðkomandi at seta spurnartekin við, um virksemið hjá Strandfaraskipum Landsins er skipað rætt í mun til tær uppgávur, sum stovnurin skal loysa í dag og framyvir.

**Sett arbeiðsbólk**

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, Jacob Vestergaard hevur fingið undirtøku frá landsstýrinum at seta ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólk at gera uppskot til, hvussu almenni flutningurin verður rikin á ein slíkan hátt, so samfelagið fær sum mest burturúr hesum tænastum innan fyri galdandi karmar.

– Úrslitið av frágreiðingini skal verða eitt tilmæli til landsstýrismannin um, hvussu virksemið hjá Strandfaraskipum Landsins verður nútímansgjørt, soleiðis at raksturin verður tíðarhóskandi, effektivur og tænir endamálinum um samfelagsligt gagn, verður sagt.

**Útseta starvsetan**

Frágreiðingin verður latin landsstýrismanninum, sum eftir at hava viðgjørt málið í samgonguni, tekur støðu til, hvussu arbeiðast skal víðari við málinum. Eftir hetta verður endaliga tilmælið skrivað og latið landsstýrismanninum til støðutakan. Miðað verður ímóti, at tilmæli, ið eisini skal innihalda eina lýsing av, hvussu ein møgulig umskipanartilgongd kann leggjast til rættist og eina fyribils tíðarætlan fyri tilgongdini, verður latið landsstýrismanninum í ár, sigur Innlendismálaráðið, sum samstundis hevur gjørt av at bíða við at lýsa starvið sum stjóri á Strandfaraskipum Landsins leyst, til endaliga frágreiðingin er latin landsstýrismanninum.

– Niels Juel Arge, fíggjarleiðari, virkar sum fyribilsstjóri.